LM-070/2025

Landsbanki Føroya
FAROE ISLANDS GOVERNMENTAL BANK

FMR
Att. Eli

Fylgiskjal 3

Tórshavn, 15 oktober 2025

Hoyringssvar til uppskot til "Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landskins játtanarskipan (Hámark fyri rakstrarútreiðlsuvøkstri og løguældtan)"

Samandráttur av hoyringsskrivinum hjá Landsbankanum:

- Eitt fíggjarpolitisk regluverk eigur umframt ásetingar um útreiðsluvøkstur, eisini at hava áseting um saldoina á fíggjarlógini
- Eitt fíggjarpolitisk regluverk eigur at fevna um meira enn eitt ár fram. Tað eigur at fevna um eitt millumlangt sigt, tað vil siga 4-5 ár fram
- Kommunurnar eiga at vera fevndar av fíggjarpolitiska regluverkinum
- Fíggjarpolitiska regluverkið eigur at seta krøv til íløgurnar. At tær spara raktrarútreiðslur, at tær hava positivt kost/nyttu úrslit, tá talan er um infrakervisíløgur, og annars at tær bøta um fíggjarpolitiska haldførið.
- Fíggjarpolitiska regluverkið eigur at áseta, at lønirnar verða javnaðar við lønarvøkstrinum, tó í mesta lagi lønarvøkstrinum á privata arbeiðsmarknaðinum
- Fíggjarpolitiska regluverkið eigur at áseta at útreiðslurnar vera javnaðar við langtíðar inflatiónini, sum er 2%
- Tað eigur at vera formalisera í lóg (møguliga hesari) at tá broytingar (tiltøk) vera gjørdar, so skulu inntøkurnar/útreiðslurnar av hesi broyting framskrivast 10-20 ár fram í tíð.

Generellar viðmerkingar

Landsbankin heldur tað er sera gott at Fíggjarmálaráðið ynskir at seta í verk eitt fíggjarpolitiskt regluverk. Eitt gott fíggjarpolitiskt regluverk kann gera tað møguligt hjá landsins myndugleikum, at stýra útreiðsluvøkstrinum.

Landsbankin hevur tó trupult við at síggja, at uppskotið nóg væl avmarkar útreiðsluvøksturin. Uppskotið sær meira út til at vera ein staðfesting av verandi mannagongdum, tá tað kemur til at gera fíggjarlóg.

Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um saldoina (úrslitið) á fíggjarlógini (hvussu stórt hall kann vera), ei heldur hevur uppskotið nakra áseting um støddina á almennu skuldini. Av tí sama, er hetta uppskot á ongan hátt trygd fyri, at politikarnir ikki kunnu føra landið í óføri.

Um ikki politikarnir eisini taka støðu til saldo og skuld í hesum uppskoti, so er eingin binding.

Landsbanki Føroya · Kvíggjartún 1 · Box 229 · FO-165 Argir

Raksturin
Sum dømi, kunnu vit hyggja at støðuni í dag. Tað er (stórt) hall á fíggjarlógini. Hóast tað, kunnu útreiðslurnar veksa við lønarvøkstrinum, javning og inflatión + ein realan vøkstur á 1%, ár fyri ár.

Játtan í 2025 til tær útreiðslur, sum sambært uppskotinum skulu javnast, eru 7,1 mia. kr. Fremur man so javningina sambært uppskotinum, so kunnu útreiðslurnar í 2026 vera 7,4 mia. kr., ella 312 mió. kr. hægri enn fyri 2025. Hetta uttan mun til um tað er yvirskot ella hall á fíggjarlógini. Í løtuni er hall á fíggjarlógini.

Sannlíkt er, at skattainntøkurnar fyri 2026 eisini hækka, tí lønargjaldingarnar hækka. Men tú hevur onga trygd fyri at tað er eitt til eitt, ella at inntøkurnar veksa líka nógv sum útreiðlsurnar, í hesum føri 312 mió. kr. Um tær ikki gera tað, veksur hallið.

Aðrar inntøkur kunnu eisini svíkja. Eitt nú kom fram, sama dag sum fíggjarlógin var løgd fram, at kvoturnar bæði fyri makrel og svartkjaft koma at minka munandi í 2026. Tað ger at tilfeingisinntøkurnar koma at minka. Mett er í fíggjarlógaruppskotinum, at tær vera 515 mió. kr. Minka tær niður í 350 mió. kr., so vera inntøkurnar á fíggjarlógini 23 mió. kr. lægri, tí Búskapargrunnurin tekur rest. Men minka tær eitt nú niður til 300 mió. kr., so minka inntøkurnar á fíggjarlógini við 23 mio. kr. + 50 mió. kr. = 73 mió. kr. (her er sæð burtur frá partinum til kommurnar)

Tekur tú ikki **atlit at saldoini** á fíggjarlógini, tað vil siga, hevur eina áseting á, hvat hallið á fíggjarlógini í mesta lagi kann vera, er einki sum tryggjar, at fíggjarlógin stuðlar undir haldførið, sum er eitt av endamálið við uppskotinum.

Fyri at røkka tí endamálið er tí eisini neyðugt at politisku myndugleikarnir **taka støðu til meira enn eitt ár fram**. Taka vit dømi omanfyri – so er kanska trupult skjótt at gera nógv við støðuna um eitt møguligt økt hall í 2026, orsakað av at tilfeingisinntøkurnar minka. Men tí er neyðugt at lógin tryggjar, at yvir millumlanga tíð, tvs 4-5 ár, so skal fíggjarlógin javnviga.

Uppskotið eigur at áseta, hvussu stórt undirskotið í mesta lagi kann vera eitt ávist ár, men yvir 4 ella 5 ár, skal fíggjarlógin javnviga. Verður tað ikki gjørt, eru stór sannlíkindi fyri at skuldin fer at veksa.

Tí mugu politisku myndugleikarnir eisini taka støðu til, **hvussu stór skuldin hjá tí almenna geiranum, herundir landskassanum kann vera**. Hetta hongur saman við støðutakanina um saldoina á fíggjarlógini (eigur at vera hjá almenna geiranum, har kommurnar eisini eru við). Tí undirskot á fíggjarlóg skulu fíggjast og harvið økist skuldin.

Samanumtikið er neyðugt at avmarka útreiðsluvøksturin. Tað ger uppskotið í ein ávísan mun. Landsbankin hevur hugt at, hvussu uppskotið hevði virkað á útreiðslurnar aftur í tíð. Og við at brúka reglurnar í uppskotinum, so høvdu útreiðslurnar verið lægri enn tær hava verið uttan regluverk. Tó skal sigast, at síðstu 10 árini ella meira hevur føroyski búskapurin verið í hákonjunkturi og útreiðsluvøksturin hjá tí almenna hevur verið stórur.

Landsbanki Føroya · Kvíggjartún 1 · Box 229 · FO-165 Argir

Men neyðugt er at hava eina áseting um saldo á fíggjarlógini eisini, annars er eingin trygd fyri, hóast reglurnar í uppskotinum, at hallið bara veksur og veksur. Ein áseting um at fíggjarlógin skal javnviga yvir 4-5 ár er neyðugt, so hallið ikki sleppur at veksa ár eftir ár.

Hvussu ger Grønland
Hyggja vit at okkara grannalondum, so hava øll sett í gildi fíggjarpolitisk regluverk. Tey byggja teirra regluverk á eina strukturella saldo. Ein strukturell saldo kann tó vera trupul at gera upp, serliga hjá einum so lítlum landið, við einum lítlum búskapi við sveiggjandi inntøkum. Men so ber til at brúka onnur amboð. Eitt nú kann vísast til Grønland, sum heldur ikki ger upp tí strukturellu saldoina.

Í Grønlandi er ásett í grein 2 í teirra lóg um fíggjarpolitisk regluverk, at fíggjarlógin skal yvir 4 ár vera í javnvág ella hava yvirskot. Reali vøksturin í einum árið kann vera 1,5%, men yvir fýra ár kann realið vøksturin ikki vera meira enn í mesta lagið 2%.

Grønland hevur eisini eina áseting um, at raksturin (rakstur og flytingar) í mesta lagi eru 93% av væntaðum inntøkunum næstu fýra árini. Tað vil siga at í minsta lagi 7% verður brúkt til íløgur.

Grønland loyvir her ein realan vøkstur, men tekur samstundis støðu til saldoina á fíggjarlógini. At tað yvir fýra ár skal javnviga ella vera yvirskot.

Løgur
Lógaruppskotið hevur eisini áseting um íløgur. Ásett er, at íløgurnar skulu ikki vera hægri enn ásett í løguætlanini fyri landi. Somuleiðis er ásett, at løguæltanin skal fevna um 12 ár, har tey fyrstu trý árini eru bindandi. Løguætlanin verður løgd fyri tingið 1. apríl á hvørjum ári, sum eitt uppskot til samtyktar.

Heldur ikki her eru nakrar ásetingar í lógaruppskotinum um, hvussu stórar íløguútreiðslurnar kunnu vera. Eingin áseting um at hallið á fíggjarlógini ikki kann vera størri enn eina ávís upphædd (til dømis eitt prosenttal av BTÚ), heldur ikki at fíggjarlógin yvir 4-5 ár skal javnviga og tí heldur eingin áseting um, hvussu stór skuldin kann verða. Aftur her hevur tú onga trygd fyri haldførið.

Lógaruppskotið hevur heldur ikki nøkur krøv til íløgurnar. Hvat eru tað fyri íløgur, landið skal gera. Hyggja vit aftur til Grønlands, so hava tey beinleiðis ásett, at í minsta lagi 7% av fíggjarlógini yvir 4-5 ár skulu brúkast til íløgur – tað vil siga tey hava óbeinleiðis ásett støddina av íløgum. Grønland hevur eisini eina áseting um, hvørjar íløgur lán kann takast til sambært § 6 stk.1 í teirra lóggávu, sum ásetur:

*"**§ 6.** Naalakkersuisut kan alene optage eller give tilladelse til optagelse af lån til investering i bolig-, erhvervs- eller infrastrukturprojekter, såfremt brugerbetalinger, reducerede offentlige udgifter eller afledte offentlige merindtægter som minimum kan finansiere de med lånet forbundne renter og afdrag. Det er endvidere en betingelse, at de nævnte investeringer skal understøtte den langsigtede finanspolitiske holdbarhed."*

Føroyska lógin eigur at hava ásetingar um, at íløgur í stóran mun mugu fara til íløgur, sum spara rakstrarútreiðslur. Um talan er um infrakervisíløgur, eigur áseting at vera um, at kost/nyttu greining skal gerast

av íløguni og at íløgurnar vera raðfestar eftir, hvat gevur samfelagnum mest. Fyri aðrar íløgur eigur at vera krav, at tær skulu bøta um fíggjarpolitiska haldførið.

Kommunur
Eitt annað sera umráðandi at fáa við í lógaruppskotið er, at regluverkið eisini skal vera galdandi fyri kommununar. Ein stórur og vaksandi partur av almennu útreiðslunum er skipaður í kommunala geiranum, men sambært lógaruppskotinum fevnir fíggjarpolitiska regluverkið einans um landsins fíggjarstýring. Sí hjálagda notat frá Johnny í Grótinum, formanninum í Búskaparráðnum, um avleiðingar, ikki at hava kommurnar við í fíggjarpolitiska regluverkinum. Notatið er sent til FMR 9. juli 2025.

Johnny vísir í notatinum á at ætlanin hjá FMR at fíggjarpolitiska regluverkið einans skal fevna um landsins fíggjarstýring kann fáa nakrar sera óhepnar avleiðingar í almenna geiranum.

Í notatinum stendur millum annað:

"Fyri tað fyrsta kann hetta gerast eitt búskaparligt insitament hjá kommununum til at víðka um sítt virksemi. Hetta tí kommunurnar kunnu økja teirra eftirspurning eftir arbeiðsmegi uttan at raka somu búskettavmarkingar sum landið, og tí kommunurnar kunnu fata afturhaldni hjá landinum sum eitt høvi til at møta lokalum
ynskjum um bøtta vælferð og tænastur.

Harnæst kann hetta umvegis arbeiðsmarknaðin fáa nakrar óhepnar avleiðingar fyri ressursuallokeringina í almenna geiranum, tí avmarkingarnar hjá landinum frígevur arbeiðsmegi, sum kommunurnar yvirtaka. Sostatt kann avleiðingin gerast, at landið tapir í kappingini um best kvalifiseraðu starvsfólkini, tá kommunurnar ikki eru avmarkaðar á sama hátt.

Fyri tað triðja kann fráveran av samskipan millum land og kommunur fáa makrobúskaparligar avleiðingar, tá kommunali tendensurin til at økja um sínar útreiðslur vil stríða ímóti royndunum hjá landinum at føra konjunkturpolitikk, serliga í hákonjunkturi, har kommunurnar vanliga uppliva vaksandi skattainntøkur og har við møguleika fyri at økja um útreiðslur sínar.

Soleiðis er tað avgerandi fyri virknaðin av fíggjarpolitiska regluverkinum, at tað fevnir um bæði land og kommunur. Um endamálið við fíggjarpolitiska regluverkinum skal røkkast, mugu kommunalu útreiðslurnar takast við í yvirskipaðu stýringina. Eisini má ein greiður insitamentstrukturur skapast í form av sanktiónum, sum eggjar kommununum at halda fast í fíggjarpolitiskt disciplin í samsvar við tað, sum verður sett í verk fyri landið."

Serligar viðmerkingar
Viðmerking til grein 1 nr 1 (§ 7 a. stk. 1) í lógaruppskotinum
Her verður ásett, at útreiðslurnar kunnu veksa við prís- og lønarvøkstrinum + 1%.

Ásett er eisini í greinini, hvørjar útreiðslur á fíggjarlógini talan er um, og hvat skal javnast við prísvøkstri, lønarvøkstri og javning.

Landsbanki Føroya · Kvíggjartún 1 · Box 229 · FO-165 Argir

Lønarútreiðslurnar eru um 50% av hesum útreiðslurnum. Pensjónin um 40% og aðrar útreiðslur tí um 10%.

Ásett er í lógaruppskotinum at

- Lønirnar vera javnaðar við lønarvøkstrinum
- At pensjónirnar vera javnarðar sum í dag, tað vil siga (lønarvøkstur+inflatión)/2
- At aðrar útreiðslur vera javnaðar við prísvøkstrinum, sum er prosentvísa broytingin í brúkaraprístalinum fyri seinast almannkunngjørda ársfjórðingin samanborið við sama ársfjórðng árið fyri. (Her skal viðmerkjast at brúkaraprístalið byggir á eina "kurv" frá 2007 og tað er harðliga tiltrongt at Hagstovan dagførir hesa "kurv", tí brúksmynstrið er neyvan tað sama í dag, sum tað var í 2007)

Her eru tvey viðurskifti, sum gera at reglunar ikki virka avmarkandi:

1) Lønirnar vera javnaðar við lønarvøkstrinum. Hetta bindir ikki politikarnir til hovligan lønarvøkstur, tí teir vita, at tað "kostar" teimum einki at geva høgan lønarvøkstur. Her eigur at vera sett eitt hámárk á. Lønirnar vera javnaðar við lønarvøkstrinum, tó hægst við lønarvøkstrinum á privata arbeiðsmarknaðinum.

2) Útreiðsluhámarkið eigur at vera sjálvstøðugt, tað vil siga ikki treytað av øðrum enn sær sjálvum. Tað vil siga ikki sveiggja saman við inntøkunum. Tað er sjálvt poengið við einum útreiðsluhámarkið – at tað er konstant meðan inntøkurnar kunnu sveiggjað. Tað vil siga, at veksa inntøkurnar meira enn útreiðslurnar, ja so er yvirskot (spara í góðum tíðum). Hinvegin veksa tær minni enn útreiðslurnar, ja so er ásetti útreiðsluvøksturin við til at stimbra búskapin (brúka í verri tíðum)

   Sambært lógaruppskotinum verða aðrar útreiðslur javnaðar við prosentvísu broytingini í brúkaraprístalinum seinast almannakunngjørda ársfjórðing, samanborið við sama ársfjórðing árið fyri. Henda áseting elvir til prosykliskan fíggjarpolitik, har inflatión eggjar til øktan útreiðsluvøkstur. Tað er aloftast í hákonjunkturi at inflatiónin er høg. Tí fer ein høg inflatión sjálvvirkandi viðføra til hægri útreiðsluloft. Til dømis var inflatiónin fyrsta ársfjórðing 2023 samanborið við sama ársfjórðing 2022 8,3%. Tað vil siga at útreiðslurnar kundu, sambært lógaruppskotinum, veksa við 8,3%, og javningin av pensjónunum, sum er 40% av útreiðslunum, við 6,1%.

   Rættari er tí at brúka trendin í inflatiónini. Trendin í inflatiónini er 2%, sum allir tjóðbankar í okkara parti av heiminum stýra eftir. Tí mælir Landsbankin til, at aðrar útreiðslur verða javnaðar við í mesta lagi 2%. Møguliga kann ein ventilur vera, har undantøk eru loyvd, eitt nú um inflatiónin hættar sær heilt øðrvísi orsakað av serstøkum viðurskiftum.

   Við at áseta inflatiónina til trendin = 2% ger eisini skipanina væl greiðari og politisku myndugleikarnir vita altíð, hvat teir skulu fyrihalda seg til. Tað er eitt av endamálunum við skipanini.

3) Sum fylgi av nr 1 og 2 omanfyri eigur javningin av pensjónum tí at vera ((lønarvøkstur (tó hægst xx%)+inflatión (tó í mesta lagi 2%))/2

Landsbanki Føroya · Kvíggjartún 1 · Box 229 · FO-165 Argir

Umframt lønarvøkstur og inflatión kann eisini loyvast ein realur vøkstur. Men eisini her má ásetast, hvussu stórur hesin í mesta lagi má vera per ár, og uppá millumlangt sigt, tvs 4-5 ár.

Viðmerking til grein 1 nr 1 (§ 7 a. stk. 4) í lógaruppskotinum
Tað átti ikki at verið neyðugt at Búskaparráðið tvær ferðir um árið almannkunnger, hvussu stórur vøksturin í útreiðslunum skal vera fyri komandi ár, um tað yvirhøvir er neyðugt at Búskaparráðið hevur hesa uppgávu. Tað er klárt definerað, hvussu hesin vøkstur skal roknast, og tí kann FMR sjálvt loysa hesa uppgávu. Eisini átti tað at verið nokk at gera hesa útrokning einaferð um árið.

Viðmerking til almennu viðmerkingarnar til 1.1.
Ein viðmerking til almennu viðmerkingarnar til 1.1. Har vísa tit til tey fýra tilmælini, sum Búskaparráðið hevði í sambandi við frágreiðingina um haldføri. Hesi fýra tilmæli eru ikki ein úttømandi listi yvir, hvat kann gerast, men bara fýra dømir uppá tiltøk. Neyðugt er at fáa útreiðlsur og inntøkur at møtast, soleiðis at tað ikki verður hall, og tí eru øll tiltøk, sum eru við til at gera, at inntøkurnar veksa og útreiðslurnar minka, góð fyri haldførið.

Umframt viðmerkingarnar omanfyri er umráðandi:

- At eitt fíggjarpolitiskt regluverk er greitt, einfalt og lætt skilligt.
- Harafturat er umráðandi, at kommunali geirin eisini er fevndur av regluverkinum.
- Neyðugt er at tað fær avleiðingar um regluverkið ikki verður hildið.
- Viðmælt verður eisini, at tað verður formaliserað, at so hvørt sum politisk tiltøk verða skotin upp, so skal politiska skipanin í hesum sambandi framskriva almennu inntøkurnar og útreiðslurnar 10 og 20 ár fram, so tað er gjøgnumskygt, hvussu tiltakið ávirkar inntøkurnar og útreiðslurnar. Tað við siga, at eitt hvørt politiskt uppskot, skal vísa á, hvat tað kemur at kosta landskassanum fram í tíð, og hvussu tað verður fíggjað.

Vinarliga

Malan Johansen, stjóri

Landsbanki Føroya · Kvíggjartún 1 · Box 229 · FO-165 Argir